

*Tommy Næs Djurhuus fer um einar tvær vikur at lata vinnuligu ferðaskrivstovuna Alpha Travel upp á farstøðini á Bursatanga*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Nýggj ferðaskrivstova á farstøðini

**Á farstøðini við Bursatanga í Havn letur nýggj ferðaskrivstova upp um einar fjúrtan dagar. Tað er fyrrverandi leiðarin á skrivstovuni hjá Maersk Air í Føroyum, sum nú fer at royna seg á egnum veingjum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Ein nýggj vinnulig ferðaskrivstova verður væntandi latin upp í Havn um einar tvær vikur. Nýggja fyritøkan fer at eita Alpha Travel, og fer at leggja seg eftir at handla við vinnufyritøkur og almennar stovnar.

Tommy Næs Djurhuus, ið eigur Alpha Travel, sigur, at ætlanin er at lata upp eina ferðaskrivstovu, sum fer at leggja seg eftir at selja ferðaseðlar og tænastur, til fólk, sum ikki vanliga ganga eftir prísinum, men heldur, hvussu eitt nú hotel, tey skulu búgva á, liggja í mun til ráðstevnuhøli, flogvallir ella hvat nú kann vera avgerandi í slíkum førum.

Eisini fer skrivstovan sum nakað nýtt í Føroyum at hava avgreiðslu alt samdøgurði, sigur hann.

Hetta er júst ein liður í teirri tænastu, ein slík vinnulig ferðaskrivstova skal geva kundum sínum, sum kunnu vera for-rætningsfólk, sjómenn ella onkur heilt annar, ið eru stødd ymsastaðni á knøttinum, har avgreiðslutíðir okkara ikki passa við tær arbeiðstíðir, ið har eru. Tá skal kundin bara kunna ringja og altíð fáa svar, sigur Tommy Næs Djurhuus.

Eisini í aðrar mátar er ein slík vinnulig ferðaskristova eisini øðrvísi enn tær, har fólk vanliga fara inn at keypa sær ein feðraseðil til Gran Canaria ella Kreta. Her fara kundarnir at hava konto, sigur Tommy Næs Djurhuus.

Nýggja ferðasskrivstovan Alpha Travel, liggur væl fyri. Hon húsast í ovaru hæddini á farstøðini á Bursatanga í Havn, har rættiliga nógv fólk kemur og fer, bæði í samband við flogrutur og aðrar rutur.

Flestu ferðaseðlarnir skulu fyrr ella seinni um flogvøllin, sigur Tommy Næs Djurhuus, so í so máta er tað høgligt at hava bussarnar standandi í túninum.

Hann roknar við at kunn lata upp um eina fjúrtan dagar ella so. Í løtuni verður bíðað eftir eini IATA góðkenning, sum skal koma úr Svøríki. Har verða settar strangar treytir, og tí er tað eitt sindur umstendiligt at fáa hesa góðkenningina. Men tá hon er komin, er klárt at fara í gongd, sigur Tommy Næs Djurhuus, sum sjálvur annar fer at arbeiða á Alpha Travel.

# Posthúsið í SMS letur aftur

Frá týsdegnum, 1. februar, verður ikki longur gjørligt at avgreiða ørindi hjá Postverkinum í SMS.

Tað hevur verið alment kent í eina tíð, at avgreiðslan í SMS fór at steingja, nú sparingar av ymsum slag enn einaferð skulu fremjast á stovninum, og mikumorgunin kom so tíðindaskriv, har endaliga avgerðina varð fráboðið.

Postsmogurnar í SMS verða tó verandi á staðnum eina tíð afturat, men ætlanin er, at hesar í framtíðini skulu flytast til høvuðsdeildina á Óðinshædd, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Flytingin viðførir sjálvsagt, at pláss verður tøkt í SMS, men enn er ikki gjørt av, hvat skal henda við hesum.

- Vit eru í ferð við at planleggja eina komandi umbygging ella renovering av SMS, og plássið, har Posthúsið hevur verið, er so ein partur av hesum, er einasta viðmerkingin, sum Hans Mortensen, stjóri í SMS, hevur til hetta.

**-jm**

# Metúrslit hjá Kaupthing Bank

**Mikumorgunin kunngjørdi Kaupthing Bank roknskapin fyri 2004**

ROKNSKAPUR
*tíðindaskriv*

Úrslitið hjá Kaupthing vaks 109,6% í 1,4 milliardir DKK í 2004. Í mun til fyri árið síðan vaks úrslitið fyri seinasta ársfjórðing 66,1%.

Nettoinntøkan vaks 52,8% meðan tilsvarandi rakstrarútreiðslur einans vuksu 32%

Rentingin av eginpeninginum eftir skatt fyri 2004 gjørdist 22,6% í mun 23% árið frammanundan,

Samlaðu ognirnar í felagnum vuksu 174,6% og eru í dag 136,5 milliardir DKK, harav útlán til kundar bankans 99 milliardir DKK. Stóri vøksturin stavar serliga frá keypinum av danska vinnilívsbankanum FIH.

Eginpeningurin í bankanum var við árslok 2004 13,6 milliardir DKK og solvensurin 14,2%.

Kreditvirðið av bankanum er enn einaferð hækkað av kreditmetingarstovnurin Moody´s.

Tað hevur eisini gingið væl hjá Kaupthing Virðisbrævameklarafelag í 2004. Kaupthing virðisbrævameklarafelag almannakunngerð sín roknskap um hálvan mars.

## SL onga viðmerking til málið

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin royndi at gjár at fáa eina viðmerking um lønarreguleringina frá Strandfaraskipum Landsins, ið er arbeiðsgevari hjá teimum, sum koyra fyri Bygdaleiðir.

Vit hittu Andrass Jensen, sum er deildarleiðari á samferðsludeildini, ið hevur Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir undir sær.

Andrass segði seg ikki hava hug at gera viðmerkingar til ítøkiliga málið, nú tað er til viðgerðar.

Spurdur, um hann vildi vátta, at lønarreguleringin er vorðin eitt stríð millum teir, sum koyra fyri Bygdaleiðir og stovnin, segði hann, at nú mugu partarnir fyrst fáa at síggja, um hetta er eitt stríð ella ikki.

- Eg eri so nýggjur í hesum starvi, at eg kenni ikki nakað serligt til sáttmálarnar, sum vóru galdandi undan hesum, vit nú hava.

Hann vísti á, at tá ið tú hevur sáttmálar við aðrar partar, vil tað altíð vera soleiðis, at einstøk mál koma upp at venda, sum hann tekur til.

- Hetta kunnu vera smá mál ella størri mál, sum partarnir tulka á ymiskan hátt.

Andrass vísti á, at tíðin fer at vísa, um tulkingarnar av lønarreguleringunum hjá teimum, sum koyra fyri Bygdaleiðir, fer at gerast eitt stríðsmál millum partarnar ella ikki.

- Men sum sagt; eg havi ongar viðmerkingar til ítøkiliga málið í løtuni, nú tað er til viðgerðar, segði Andrass Jensen, tá ið Sosialurin tosaði við hann í gjár.

**Ikki at hitta**

Vit royndu eisini at fáa viðmerkingar frá Sigmundi Poulsen, sakførara, til málið um lønarreguleringina, men sambært skrivstovu hansara verður Sigmund ikki at hitta aftur fyrr enn í dag.

Teir, sum koyra fyri Bygdaleiðir, siga seg hava togast við stovnin um lønarreguleringina tað mesta av einum ári.

- Vit eru fullkomiliga ósamdir um tulkingina av hesum partinum av sáttmálanum og hava tí vent okkum til sakførara, sum fer at taka málið upp fyri okkum, siga bussførararnir, sum longu hava avgjørt, at málið fer til ein gerðarrætt, um sakførarin metir, at hetta er gongda leiðin.